## DAGSINS MEINING

# Nyrup

Hann var góður forsætisráðharri fyri Danmark, men hann var ikki serliga góður politiskari leiðari fyri danska javnaðarflokkin. Týsdagin boðaði Poul Nyrup Rasmussen frá, at hann fer frá sum formaður fyri danska javnaðarflokkin, og at ein eyka landsfundur í desember skal velja nýggjan formann.

Allir fjølmiðlar og eygleiðarar í Danmark eru samdir um, at Poul Nyrup Rasmussen var ein góður forsætisráðharri. Saman við Mogens Lykketoft sum fíggjarmálaráðharra fekk hann gongd á aftur búskapin. Teir "kick-startaðu" búskapin, sum eitt danskt blað skrivaði nú í vikuni.

Tað hevði við sær, at arbeiðsmarknaðurin fekk brúk fyri nógv meiri fólk, og so nógv arbeiðspláss vórðu skapað tey 9 árini, Poul Nyrup Rasmussen var forsætisráðharri, at arbeiðsloysi, sum hevði verið stórt líka síðani oljukreppurnar í 70-árunum, minkaði niður í nærum einki.

Harafturat hevði búskaparligi vøksturin tað við sær, at fíggjarligu hallini hvurvu. Danmark rindar eisini av álvara niður uttanlandsskuldina, sum vaks seg stóra í teimum fyrstu kreppuárunum, tá javnaðarstjórninirnar hjá Anker Jørgensen ikki fingu bilbult við skeivu búskapargongdini.

Samstarvsfelagarnir Poul Nyrup Rasmussen og Mogens Lykketoft prógvaðu, at eisini ein javnaðarstjórn kann fáa og hava skil á búskapinum, sum var ein av borgarligu ræðumyndunum í 70- og 80-árunum! Men tann búskaparligi vøksturin og tey nógvu arbeiðslplássini taldu ikki við í hugaheiminum, tá krossurin varð settur 20. november ífjør.

Danski javnaðarflokkurin fekk ein so dyggan lúsing, at hann fyri fyrstuferð í meiri enn 70 ár ikki var størstur á Fólkatingi. Tá skuldi Poul Nyrup Rasmussen havt lagt frá sær, men hann valdi at vera sitandi. Hann hevur arbeitt við at skapa eina endurnýgging, uttan at tað er vorðið greitt, hvørja kós henda endurnýgging skuldi hava.

Hann hevur ikki megnað at skapa flokkinum nakran profil sum andstøðuflokkur, og hann hevur ikki megnað at fáa býtt veður og vind líka og fáa røttu persónarnar í tey ymisku álitisstørvini í politiska arbeiðnum á Kristiansborg. Tað evur verið so galið, at eygleiðarar siga, at tann borgarliga stjórnin hevur fingið alt ov nógvan frið at reka sín egna politikk.

Hóast nógvar ymiskar - og ikki sørt negativar - metingar um Mogens Lykketoft, eru allir eygleiðarar samdir um, at hann kann savna flokkin og geva Anders Fogh Rasmussen ein skarpan gang. Báðir eru gløggir og kønur í búskapi, so har verður óivað mangur hanakampur at hoyra og síggja í framtíðini.

Men flestu eygleiðarar seta spurnartekin við, um hann kann vinna danska javnaðarflokkinum stjórnarvaldið aftur á næsta vali. Tað eydnast neyvan, halda teir.

Fyri føroyingar verður Poul Nyrup Rasmussen settur í samband við kreppuna, hóast Anders Fogh Rasmussen og Poul Schlútter høvdu lagt kósina frammanundan. Hann taklaði ikki serliga væl ynskini hjá sitandi samgongu um fullveldi við skiftistíð og hann var óivað medvirkandi til, at Javnaðarflokkurin ikki fekk mann valdan á seinasta fólkatingsvali.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Útbúgvingar innan okkara høvuðsvinnu - niðurprioriteraðar

**Bárður Nielsen, Løgtingsmaður**



Vit hava seinastu mongu árini tosað nógv um førleikamenning og grannsking, men ikki eru vit komin nógv longri við hesum enn bert prát. Vit liva mestsum einans av fiski og tað er her vit eiga at skapa neyðugu fortreytirnar fyri at menna okkara førleika innan hesa vinnu og soleiðis verða við í fremstu røð, tá ið tað snýr seg um framburðin, bæði tøkniliga og innan nýggjar marknaðir.

Vit hava ein fiskivinnuskúla, sum hevur verið skerdur líka frá byrjan, men hóast hetta hevur hann ment seg til tað hann er í dag. Men spurningurin er hvussu leingi leiðsla, lærarar og næmingar støðast undir so ósømiligum karmum sum fiskivinnuskúlin hevur at virkað undir í dag. Í staðin fyri at gera íløgur í ein veruligan og áhugaverdan fiskivinnudepil, sum fær skapt áhuga millum ungdómin, at utbúgva seg innan okkara høvuðsvinnu, hevur onki verið í vegin tá ið talan hevur verið um at byggja fleiri studenta- og handilsskúlar. Alt gott um tað, men hví ikki eisini røkja okkara høvuðsvinnu og við hesum fáa økt um okkara útflutningsvirði, tí tað er veruleikin í dag, at ein stórur partur av okkara rávøru fer óvirkaður av landinum.

Tað seinastu sum landsstýrið er komið við, er at nú skal kostnaðarendurgjaldið fyri yrkisskúlarnar lækkað frá 100% til 75%. Grundgevingarnar eru, at hetta var ein kreppuloysn fyri at fáa fleiri lærlingar, eftir at mestsum eingin handverkaralærlingur hevði verið í fleiri ár. Hetta endurgjaldið bleiv hækkað í 1998 tá ið allir høvdu nokk at gera. Veruleikin er nokk at her eru nakrar milliónir, sum landskassin kann fáa hendur á, nú tað stendur á at fáa fíggjarlógina fyri 2003 at hanga saman. So vit kunnu helst vænta okkum fleiri slíkar spariætlanir komandi vikurnar.

# Okkara vágatunnil!

**Magni Thomassen**
*stjóri í Sandavágs Timburhandli og Kovanum*



Í nógv ár hava vágafólk bíðað við ferjulegurnar í Vestmanna og á Oyrargjógv. Tað almenna ferðasambandið um Vestmannasund var ongantíð lagað til tørvin hjá fólki og vinnu í Vágum. Annar tørvur varð tikin fram um – og vit bíðaðu. Henda almenna misrøkt av útjaðaranum og stak vánaligu karmar hjá vinnuni førdu við sær, at vágafólk saman við nøkrum streymoyingum løgdu fram ymisk uppskot um fast samband um Vestmannasund.

Við tógvið stríð og so at siga ongari fíggjarligari hjálp fingu vit umsíður landsins myndugleikar at geva loyvi til at gera ein undirsjóvartunnil.

Nú var hugaligari at bíða.

Um stutta tíð eru vit liðug at ilskast inn á vánaliga ferðasambandið um Sundið. Nú er okkara mál rokkið. – Alt verður so gott – trúðu vit.

Nei, nú varð annað haft lagt á okkum, sum ræðast teir at sleppa okkum leysum. Okursprísir verða lagdir á vágafólk og serliga vinnuna, sum framman undan var nóg illa fyri.

Men hóast tosað verður um at skapa góðar karmar fyri vinnuna og at meira eigur at verða gjørt fyri útjaðaran, so er ongin sjón fyri søgn. Fyrr varð øll vøra til oynna lossað upp her vesturi. Hetta arbeiðið mátti flytast til Havnar. Vit mistu arbeiðspláss og havnapengar.

Við okursgjaldi undir Sundið verður øll framleiðsla í Vágum nærum løgd lamin. Tann sunna kappingin, teir góðu karmarnir og útjaðarapolitikkurin eru bert fundarfjas og tómt tos hjá teimum stýrandi.

Tað er ófatiligt, at vinnan í Vágum skal gjalda fyri ferðing hjá 300-400.000 ferðafólkum, sum árliga fara ígjøgnum vágatunnilin.

Soleiðis sum tey ymisku gjøldini eru lýst at verða, kunnu vit bert staðfesta, at stýrið veit onki um, hvussu oyggjarfólk búleikast og hvørjum vána sømdum tey liva undir. Bilur er til hvørt húski í Vágum sum alneyðugt hjálpartól. Tað er *ikki* hjálpartólið, sum vil um (undir) sundið, men fólkini, sum eru í teimum ymisku akførunum. Tí eru tað vit ferðafólk, sum eiga at gjalda fyrst og fremst, meðan akførini hava sín prís.

Latið nú okkum bara sjálv taka okkum av vágatunnlinum og stýra afturgjaldingini. Tá vit hava megnað øll hini tøkini, megna vit eisini við skili at loysa teir trupulleikar, sum onnur royna at leggja á okkum. Vit hava stríðst fyri hesum fasta sambandinum um Vestmannasund og eru nádd á mál. Vit hava glett okkum, sum arbeiðið leið, nú ynskja vit eisini við gleði at brúka og at gjalda vágatunnilin.

(Hervið er ynski um, at stýrið fyri vágatunnilin verður sent heim, og at Felagskommunan tekur við).


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ein heilsan til 10-ára haldið hjá ALS

**Kanning staðfestir, at við høgum arbeiðsloysisútgjaldi og eftirútbúgvingum fáa vit ein góðan og smidligan arbeiðsmarknað**



**HANS PAULI STRØM, JAVNAÐARMAÐUR**

Eitt aðalmál við einum skilagóðum arbeiðsmarknaðarpolitikki er at skipa viðurskiftini so, at tey fremja ein smidligan arbeiðsmarknað. Tvs. at arbeiðsmegin skal hava lætt við at flyta seg á arbeiðsmarknaðinum: Frá størvum, arbeiðsplássum og vinnum, har tað trongir samanum - Til størv, arbeiðspláss og vinnur, sum eru í vøkstri og har tað er veksandi eftirspurningur eftir arbeiðsmegi. Tá slepst undan darvandi trekleika og sonevndum fløskuhálsum, arbeiðsloysi á summum økjum og manglandi arbeiðsmegi á øðrum.

Nú er váttað við víðfevnandi altjóða kanning, at eitt høgt endurgjald við arbeiðsloysi er ein av fyritreytunum fyri at einum slíkum smidligum arbeiðsmarknað!

Tað er arbeiðsmálaráðið í týsku landspartastjórnini í Nordrhein-Westfalen, sum hevur gjørt eina samanberandi kanning av arbeiðsmarknaðarviðurskiftum í Danmark, Týsklandi, Hollandi og Onglandi. Niðurstøðan í kanningini er, at danski arbeiðsmarknaðurin er vinnarin, tí hann er bestur til at sameina góða sosiala trygd og stóran fleksibilitet - tað sum tey í kanningina kalla "flexicurity".

Tað sum serstakliga ger danska arbeiðsmarknaðin til tann smidligasta og tryggasta, er tað høga dagpengaendurgjaldið við arbeiðsloysi. Hetta er upp til 90% av seinastu miðallønini. Sagt verður, at fyrimunurin við danska modellinum er, at fólk rætt og slætt ikki eru so bangin fyri at missa starvið. Tey krøkja seg ikki í tað fyri einhvønn prís og ræðast ikki fyri at skifta, sjálvt um vandi skuldi verið fyri, at tey gjørdust arbeiðsleys eina tíð. Tí tey vita, at dagpengaendurgjaldið fyri mistu inntøkuna er so mikið høgt, at tey koma ikki illa fyri, ongin vandi er fyri at noyðast at fara frá húsi og heimi. Danski løntakarin torir tí betur enn hinir at flyta seg, taka kjansir, ganga nýggjar leiðir og taka við nýggjum avbjóðingum í arbeiðslívinum.

Haraftrat vísir kanningin á, at eisini góðir møguleikar fyri eftirútbúgving eru avgerandi fyritreyt fyri tí smidliga arbeiðsmarknaðinum. Her ger serliga tann vælvirkandi almenna skipanin við arbeiðsmarknaðarútbúgvingum í Danmark munin. Kanningin vísir, at 20% av donsku løntakarunum hava fingið lut í eftirútbúgvingum, samanborið við bert 6% í Týsklandi.

Hetta er nakað at læra av, nú ALS hátíðarheldur síni 10 ár. Tí hvørgin av hesum nevndu fyritreytum fyri einum góðum, effektivum og smidligum arbeiðsmarknað eru í Føroyum. Vit høvdu dumpað so syngjandi, vóru Føroyar við í hesi kanningini. ALS-endurgjaldið uppá í mesta lagi 70% av eini arbeiðsmannaløn er so lágt, at tað er ein skandala. Líka so vánaligt ella rættari enn verri statt er við møguleikunum fyri eftirútbúgving. Teir eru so at siga ikki til.

ALS eigur tí beinanvegin sum tað fremsta málið í sínum næsta 10-áraskeiði at fáa endurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku upp á eitt sømiligt og skilagott støði. Fyrsta stigið á hesi leiðini ber til at seta í verk, nú Javnaðarflokkurin hevur uppskot á tingborði um at hækka útgjaldið til 80%. Næsta stigið er at fáa sett eina skipan við arbeiðsmarknaðarútbúgvingum á stovn. Hetta hevði Javnaðarflokkurin uppskot til í okkara valskrá. Tað er gleðiligt, at landsstýriskvinnan í mentamálum er av somu hugsan, og er Javnaðarflokkurin altráður eftir at fáa uppskot hennara á tingborð, so vit sum skjótast kunnu bjóða føroysku løntakarum alneyðugu møguleikar fyri arbeiðsmarknaðarútbúgvingum.

# Vágatingmenn – váðatingmenn

**ÓLAVUR GROTH**

Ja, nú er nógv frammi um Undirsjóvartunnilin. Eg hoyrdi Marius Dam nú eitt kvøldið siga í útvarpinum, at hann ivaðist í at taka seg burtur úr politikki. Tað haldi eg vera tað skilabesta, eg nakrantíð havi hoyrt hann siga. Hann skal jú eitast at vera annar av kommunulæknunum í Vágoynni. Tað vil siga, at tá hann er av oynni, er Vágoyggin skerd við helvtini av læknabestandinum, og tá hann nú ætlar at sleppa at koyra fyri einki í tunnlinum, verður hann helst sjálvdan í oynni. Hvat siga vágafólk, føla tey seg trygg við at vera skerd so nógv læknaliga? Nú tá ið ferðslan fer at økjast, er tað tá nógv trygt einans at hava ein lækna í Vágoynni. Tingmannalønina settu teir upp við eini 40 prosentum, við tí grundgeving, at tingmenn skuldu kunna liva av lønini og ikki hava onnur størv, geldur hetta ikki eisini Marius Dam. Tíbetur hava vit aðrar seriøsar kommunulæknar (Andrias Petersen), ið taka síni størv í álvara og fara í farloyvi orsakað av tingarbeiðinum. Vit hoyra nøkur fá vágafólk gremja seg um prísin gjøgnum tunnilin, sum einans økist við 10-12 prosentum fyri vanliga borgaran.

Já nú hoyrdu vit Suna Jacobsen í sendingini í dag. So vítt eg veit er hann lærari, vóni ikki fyri vágafólk, at hann undirvísir í støddfrøði. Hann fekk roknistykkið til kr. 5.000,00 um mánaðin fyri eitt vágafólk at koyra, sum arbeiddi í Havn.

Jóanis Nielsen helt, at nevndin fyri tunnilin fór púra skeiv, tá teir gingu út frá at 350 bilar koyrdu ígjøgnum um samdøgrið. Hann helt, at talið fór meira at líkjast 5-600 bilar um samdøgrið og hótti við at slíta samgonguna, um ikki prísurin bleiv broyttur beinanvegin.

Nei Jóanis sit nú hetta skeiðið út og stilla so bara ikki uppaftur. Tí um tín spádómur gongur út uppá so nógvar bilar, ja so finnur nevndin í Vágatunnlinum sjálvandi sjálv út av at redusera prísin.

Karsten Hansen, tað er gott at tú heldur fast um prísin. Tað eru slíkir menn, vit hava brúk fyri í politikki og ikki slíkar, ið bara vilja tekkjast veljarunum.

Eg veit eisini, hvat tað vil siga ikki at búgva í meginøkinum. Tað hevur sín prís at búgva í tí sokallaða útjaðaranum, og tað hevur so sanniliga eisini sínar fyrimunir.

Vágafólk burdu fegnast um, at tey koma nógv nærri meginlandinum (tað rokni eg nú eisini við, at teir flestu gera).

Eg vóni, at Vágatunnilin verður ein stór sólskinssøga og gevur okkum vón um skjótt at kunna fara undir Norðoyatunnilin við góðum treysti.

# Fankenstein í Fuglafirði

**SJÓNLEIKUR**
*Klaksvíkar Sjónleikarafelag*



Komandi vikuskifti fáa onnur enn Norðoyingar møguleikan at síggja vælumtókta skemtileikin, tí tá fer Klaksvíkar Sjónleikarafelag at ferðast við Frankenstein.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur hesuferð valt at framføra leik, ið er bygdur yvir skaldsøguna Frankenstein, sum Mary Shelley upprunaliga skrivaði í 1818, um Dr. Frankenstein og skapning hans. Danin Thomas Malling hevur umskrivað skaldsøguna til skemtileik. Andrias Justesen hevur umsett leikin og Jákup Weyhe hevur leikstjørna.

Tað eru 10 leikarar við í leikinum, og eru flestallir gamlir kenningar við nógvum royndum á palli, tó eru onkur nýggj talent við fyri fyrstu ferð.

Frankenstein hevur verið sýndur í Klaksvík 14 ferðir og hevur leikurin verið sera væl vitjaður. Nógv fólk hava verið í Atlantis og flent at Frankenstein. Ummælini hava verið góð og fólk hava verið væl nøgd.

Nú vera tað fólk í Eysturoynni, sum fáa møguleikan at síggja Frankenstein, tí týsdagin 26. nov. og mikudagin 27. nov. klokkan 20.00 verður leikurin sýndur í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Seinni verður farið til Havnar við leikinum.

Forsøla av atgongumerkjum verður í kunningarstovuni í Fuglafirði og við dyrnar undan sýning.

Tað er lagt upp til, at Klaksvíkar Sjónleikarafelag aftur í ár verður garantur fyri, at nakað veruligt verður at flenna at á føroyskum sjónleikarpallum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra kona, mamma, omma og langomma

**Beata Jacobsen**
Syrðugøta

andaðist á Eysturoyar ellis- og røktarheimi hósdagin 21. november, 77 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík leygardagin 23. november kl. 14.30.
Jarðarferðin verður úr Filadelfia í Gøtu sunnudagin kl. 13.30.

*Vegna familjuna*

**Elias, Bergleif og Klæmint**

Tey, ið vilja minnast Beatu, kunnu lata Eystuoyar røktar- og ellisheimi eina gávu.